## Yvirtekur fíggjarstovnar

Amerikanska stjórnin tók í gjár yvir á tveimum stórum fíggjarstovnum í kreppu, Fannie Mae og Freddie Mac. Hetta hendir fyri at forða fyri einari versnan av framman undan álvarsligu kreppuni á amrikanska bústaðar- og fíggjarmarknaðunum, sigur amerikanski fíggjarmálaráðharrin, Henry Paulson. – Fannie Mae og Freddie Mac eru so stór og so samantvinnað við fíggjarligu skipanina, at tað hevði ført til ógvusligt rumbul á fíggjarligu marknaðinum her í landinum og í heiminum, sum bert annar av hesum fíggjarstovnum fer av knóranum, segði fíggjarmálaráðharrin í Washington í gjár.

## TDC koyrir 400

Størsta telefyritøka í Danmark, TDC, fer nú at skarva 400 størv burtur. Tað varð upplýst á einum tíðindafundi í morgun.Minkingin í starvsfólkatalinum verður um 400. – Tað er ongantíð lætt at gjøgnumføra ein niðurskurð í starvsfólkatalinum, men tað er okkara ábyrgd at reagera skjótt, tá marknaðurin ikki mennir seg sum væntað, og tað er ein staðfesting, at okkara kostnaðarstøði framvegis er og høgt, sigur forstjórin í TDC, Jens Alder. Meginparturin av koyrdu starvsfólkunum fara úr starvi 1. oktober. Samstundis verða 200 ósett størv ikki mannað, skrivar Jyllands Posten.

# 3000 runnu fyri heilsuni



**Í gjár var eitt tað største ítróttartiltakið, sum nakrantíð hevur verið í Føroyum. Fólkaheilsurenningin 2008 var í vikuskiftinum. Í Klaksvík leygardagin og í Tórshavn sunnudagin. Tiltakið í Tórshavn var á økinum rundanum SMS**

FÓLKAHEILSA

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í Klaksvík var renningin leygardagin. Eini 800 fólk luttóku, og sum skilst eydnaðist væl. Stóra tiltakið var tó í Tórshavn, har eini 1500 fólk høvdu meldað seg til áðrenn sunnudagin, men tá renningin skuldi byrjað var talið nærri 3000. Tað hevði við sær at ov fáir vestar og ov fá nummør vóru til taks. Men fyrireikararnir vóru glaðir fyri hendan trupulleikan.

Renningin fór í gongd umleið klokkan eitt, eftir upphiting og røður. Tá tustu øll fólkini avstað til fýra ymiskar teinar. Tí hóast tveir teinar vóru í heilsurenningini, vóru eisini maraton- og hálvmaratonrennararnir við til startin.

### Fegin borgarstjóri

Heðin Mortensen legði fram røðu áðrenn fari var til upphiting. Í røðu síni segði Heðin Mortensen millum annað, at renning er vorðin at náttúrligur partur av gerandislívinum hjá alt fleiri føroyingum, samstundis sum hann hugleiddi eitt sindur um Fólkaheilsurenningina.

- Tankin aftanfyri Fólkaheilsurenningina fyri børn og vaksin er at betra um fólkaheilsuna hjá føroyingum, og endamálið er eisini at fáa so nógv fólk við sum gjørligt, so hesin heilsubati verður meira sjónligur og fær størri undirtøku, segði borgarstjórin í Tórshavnar kommunu millum annað.

### Upphiting og renning

Eftir at Heðin Mortensen hevði borið fram røðu, varð skipað fyri upphiting. Øll 3000 stóðu tá og hoppaðu og strektu saman við instruktørinum á lítla pallinum. Síðani setti Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum, renningina í gongd.



*3000 fólk hitaðu upp uttan fyri SMS áðrenn*

Klokkan gott eitt tusti stóra mannamúgvan oman eftir Húsagøtu, summi rennandi, summi gangandi og okkurt barnið lá eisini í onkrum barnavogni.

### Vatn og frukt

Eftir stuttari tíð byrjaðu tey fyrstu av styttra teinunum at koma til málið. Tá tey komu á mál fingu tey ein posa frá SMS við vatnið og frukt, sambært andanum hjá heilsurenningini.

Sum heild vóru fólk heilt væl nøgd við túrin, og gleddust um stóru fólkamongdina.

### Vónar at fleiri byrja at renna

Aftaná renningina tosaði Sosialurin við Bjørk Herup Olsen, sum er ein av talentríkastu rennarunum í landinum.

- Eg haldi hetta vera eitt sera gott tiltak, og eri ordiliga glað fyri at so nógv fólk luttaka. Tað sigur eitt sindur um hvussu stór renning er blivin. Kanska fáa vit eisini fleiri fólk at renna meira seriøst og tað hevði sjálvandi verið stuttligt, sigur Bjørk Herup Olsen.



*Eftir at hava runnið fingu fólk vatn og frukt*



*Hesin hundurin var væl fyrireikaður at renna í gjár*